## Gerry McCann í Portugal

Foreldrini hjá ensku gentuni Madeleine McCann, sum hvarv í Portugal fyri skjótt tveimum árum síðani, hava ikki mist vónina um at finna gentuna aftur á lívi. BBC veit at siga, at pápin, Gerry McCann, skal aftur til Portugals at virka við í einum filmi, sum skal royna at lýsa, hvat hendi tað kvøldið, Madeleine hvarv úr einari íbúð í frítíðarstaðnum Praia da Luz. Talsmaðurin hjá McCann-hjúnunum, Clarence Mitchell, sigur, at eitt mál við filmsupptøkuni er at vita, um hon kann fáa onkran at minnast eitt ella annað, sum kann hava týdning fyri málið. Tann trý ára gamla Madeleine McCann hvarv tann 3. mai í 2007.



## Tsvangirai mist abbason

Tað er líkt til, at zimbabwiski stjórnarleiðarin, Morgan Tsvangirai, verður raktur av einari vanlukkuni fyri og aðrari eftir. Fyri nøkrum fáum vikum síðani misti hann konuna í einari ferðsluvanlukku, og nú er ein tvey ára gamal abbasonur hansara duknaður. Drongurin, sum æt Sean, druknaði í einum svimjihyli hjá familjuni leygardagin, sigur ein talsmaður hjá Tsvangirai. Tann lítli búði í Kanada saman við foreldrunum, men var komin til Zimbabwe at fylgja ommuni til gravar. Ætlanin var, at tey skuldu fara aftur til Kanada í gjár, men nú verður tann lítli ístaðin jarðaður undir liðini á ommu síni, skrivar Reuters.

# ann fólksligi lívsnjótarin



Lars Løkke Rasmussen at umsita fíggjarmál, og tað málsøkið røkir hann, til hann sjálvur hevur tilnevnt sín eftirmann.

### Í andgletti

Lars Løkke Rasmussen ber sum nevnt orð fyri at vera ein dugnaligur samráðingarmaður, men samstundis ein, sum hevur ilt við at slaka fyri øðrum sjónarmiðum enn sínum egnu. Tað hevur havt við sær, at hann hevur ofta verið í andgletti, síðani hann gjørdist ráðharri. Eitt nú leikaði mangan hart á, tá hann var ráðharri í heilsumálum. Orðaskiftið, sum ofta var kensluborið, snúði seg um viðgerðartrygd, bíðilistar og onnur viðurskifti í heilsuverkinum, og fjølmiðlarnir skrivaðu um, at sjúklingar doyðu í bíðitíðini.

Undan hesum kjakinum hevði Lars Løkke Rasmussen sum innanríkisráðharri verið faðirin at teirri stóru kommunusamanleggingini, sum broytti tað kommunala landskortið. Eisini her var orðaskiftið bæði hvast og kensluborið, men ráðharrin stóð við sítt, og tann 1. januar í 2007 bleiv kommunutalið skert meiri enn einma helvt, samstundis sum amtini fóru í søguna.

Tann nýggi forsætisráðharrin hevur fleiri ferðir verið forsíðuevnið í teimum donsku bløðunum, og tað hevur ikki verið fyri tað góða. Ekstrablaðið hevur skrivað um vantandi skjøl, og aðrir miðlar hava eisini umrøtt hansara tokka til góðan mat, alkohol og sigarettir. Hann tykist hava lagt hetta aftur um seg nú, og klárar hann seg væl sum stjórnarleiðari og heldur sær í skinninum, verður tann parturin av umdømi hansara ivaleyst lagdur í skuffuna í blaðhúsunum.

### Fjallmaður

Felags fyri nýggja forsætisráðharran og báðar teir undanfarnu er eftirnavnið Rasmussen, men harafturat eru teir allir ættaðir úr Jyllandi. Lars Løkke Rasmussen er føddur í Vejle tann 15. mai í 1964, men vaks upp í Græsted á Norðursælandi, hagar foreldur hansara, Jeppe og Lise Løkke Rasmussen, fluttu.

Eftir at hava tikið studentsprógv fór Lars Løkke Rasmussen á lærda háskúlan í Keypmannahavn, har hann tók løgfrøðiligt embætisprógv. Í 1994 varð hann valdur í Fólkatingið fyri Vinstra.

Fimm ár frammanundan, í 1989, giftist Lars Løkke Rasmussen Sólrun Jákupsdóttir. Soleiðis vildi lagnunnar speisemi tað so, at tann fyrsta føroyska forsætisráðharrafrúan í Danmark er abbadóttur ein av teimum ídnastu føroysku loysingarmonnunum, Sigurð Joensen sála.

Men tað munnu bygdarmenninir hjá Sigurði ikki vera so harmir um. Lars Løkke Rasmussen er skemtingarsamur maður og kann gera góðan mun, tá um ræður at halda hýrinum uppi ein strævnan fjalldag í haganum Sáttarenni, soleiðis sum myndirnar á hesari síðuni eisini vísa.

## Fer at skipa nýggjar ráðstovur

**Nýggi forsætisráðharrin í Danmark fer væntandi at broyta stjórnina, bæði hvat viðvíkur ráðstovum og ráðharrum**

Í fyrsta lagi er greitt, at Danmark skal hava annan fíggjarmálaráðharra fyri Lars Løkke Rasmussen. Harafturat hevur Karen Jespersen boðað frá, at hon vil sleppa frá sum vælferðarráðharri.

Politiskir eygleiðarar í Keypmannahavn siga, at hetta seinna kann hava við sær, at vælferðarmálaráðið verður býtt sundur í eitt íbúðar- og innanríkismálaráð og eitt almanna- og javnstøðumálaráð.

Harafturat vænta eygleiðararnir, at Lars Løkke Rasmussen fer at niðurleggja innflytaramálaráðið og granskingarmálaráðið. Tað merkir so helst, at Birthe Rønn Hornbech og Helge Sander fara úr stjórnini.

Mangt bendir á, at Claus Hjort Frederiksen, arbeiðsmálaráðharr, verður nýggjur fíggjarmálaráðharri, og at Peter Christensen fer at loysa Claus Hjort Frederiksen av. Hann er framsøgumaður hjá Vinstra í fíggjarmálum.

*Forsætisráðharrafrúan helt seg heldur ikki aftur, men leiddi ærnar til klippingar*

*Mynd: Ásfinn Sigvardsen*

